## STUTT SAGT

### Í neyð av flóttafólki

Myndugleikarnir í Kanarisku Oyggjunum hava biðið um hjálp, eftir at meiri enn 900 flóttafólk úr Afrika komu til oyggjarnar í vikuskiftinum.

Í gjár komu umleið 400 flóttafólk til Tenerife, Gran Canaria og La Gomera, og leygardagin tók eitt spanskt sjóverjuskip 450 flóttafólk upp stutt frá strondini á Kanarisku Oyggjunum. Dagin fyri steðgaði sjóverjan fleiri bátum við umlæeið 200 flóttafólkum, sum vóru á veg ímóti oyggjunum.

Ein talsmaður hjá myndugleikunum á oyggjunum segði við útvarpið Cadena Ser, at teir hava biðið um fund við sponsku stjórnina, og boðini haðani vóru, at flóttafólkini skuldu flytast aftur til heimlandið. Tað verður kortini ikki gjørt beinanvegin, skrivar Reuter úr Madrid.

### Gjørt søguligan sáttmála

Vietnam hevur gjørt ein handilssáttmála við USA, og hann verður mettur sum fyrsta stigið ímóti vietnamesiskum limaskapi í altjóða handilsfelagsskapinum WTO.

Amerikonsku myndugleikarnir siga sáttmálan vera eitt søguligt framstig í viðurskiftunum ímillum USA og tað kommunistiska Vietnam. Tað sama sigur vietnamesiski handilsmálaráðharrin, Truong Dinh Tuyen, við eitt vietnamesiskt blað sambært Reuter. Hann hevur júst verið í Washington og lagt síðstu hond á samráðingarnar saman við amerikonskum embætismonnum.

Enn er einki kunngjørt um smálutirnar í sáttmálanum.

### Beit flogternu

Eitt flogfar hjá bretska flogfelagnum British Airways, sum var á veg úr London til New York, noyddist at neyðlenda í Kanada fríggjadagin, eftir at eitt av ferðafólkunum hevði gjørt í so nógv um seg.

Talan var um eina 32 ára gamla svenska kvinnu, sum brádliga gjørdist púra frá sær sjálvum. Sambært blaðnum Expressen rann hon aftur og fram í flogfarinum, og tá ein av flogternunum royndi at steðga henni, gjørdi svenska kvinnan ikki mætari enn at bíta flogternuna. Tá løgdu onnur uppí, og kvinnan bleiv løgd í hondjørn.

Flogskiparin gjørdi av at lenda á einum hernaðarflogvølli í Goose Bay í Kanada, har tann illa kvinnan varð latin kanadisku løgregluni. Gwen Jones, talskvinna hjá British Airways, sigur við Expressen, at svenska kvinnan kann vænta sær eina stóra rokning frá flogfelagnum. Hon er skuldsett fyri at hava brotið altjóða reglur um flúgving og fyri onnur lógarbrot. British Airways fer møguliga eisini at krevja endurgjald frá kvinnuni, tí flogfarið noyddist at bíða tveir tímar í Goose Bay, áðrenn tað kundi halda leiðina fram til New York.

Sambært Expressen býr tann 32 ára gamla kvinnan í London, har hon lesur løgfrøði.

### Horvin í 30 ár

Tann 14. mai í 1976 kom Eric Douglas Nielsen eftir tvey ára gomlu dóttur síni, tí hann skuldi hava hana nakrar dagar, men gentan kom ongantíð aftur.

Øll árini síðani hevur mamman, Laura Gooder, livað í óvissu, men í gjár - júst á 30 ára degnum - kom ein løgreglumaður á dyrnar og greiddi henni frá, at dótturin er á lívi. Tað vísti seg, at gentan hevði fingið eitt annað navn, og hon hevði fingið at vita, at mamman var deyð í einari ferðsluvanlukku.

- Nú bíði eg bara eftir, at hon fer at ringja, sigur Laura Gooder við The Detroit News.

Løgreglan hevur sóknast eftir Eric Douglas Nielsen øll 30 árini. Undir kanningunum kom løgreglan eftir, at hann hevði eisini fingið sær annað navn, og at hann situr í einum fongsli í statinum Arizona, har hann er dømdur fyri annað lógarbrot. Nú verður hann so eisini skuldsettur fyri burturflyting.



**Við buldur og brak**

*Tað 3.000 metrar høga indonesiska gosfjallið Merapi fór at goysa í nátt. Gosið kom ikki óvart á fólk, tí jarðfrøðingar hava leingi ávarað um, at eitt gos var á veg. Í dag rann brennandi grót oman eftir fjallinum, men myndugleikarnir stúrdu mest fyri gassinum, sum kann vera sera eitrandi.*

# Veðurlagsbroytingarnar raka serliga tey fátæku

**Broytingarnar í veðurlagnum fara at elva til vatnflóð, turk og hungursneyð, og tey fátæku verða harðast rakt**

VEÐURLAGIÐ

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tað verða tey fátæku londini, sum serliga fara at kenna sviðan av broytingunum í veðurlagnum. Tað er niðurstøðan í einari nýggjari frágreiðing, sum bretski neyðhjálparfelagsskapurin Christian Aid almannakunngjørdi í gjár.

Í frágreiðingini verður staðfest, at veðurlagsbroytingarnar hava longu fingið sína ávirkan, og at gongdin fer at halda fram. Ein avleiðing verður, at sjúkur sum eitt nú malaria fara at breiða seg skjótari enn nú, og í tí sambandi væntar Christian Aid, at 185 milliónir fólk fara at doyggja av ymsum sjúkum í londunum í syðra parti av Afrika. Harafturat fara fleiri milliónir fólk at doyggja av vatnflóð, turki, hungursneyð og kríggi. Felagsskapurin vísir í hesum sambandi á, at har norðuri í Kenya eru fólk longu farin at berjast um vatn.

- Vanlukkan í Eysturafrika, har 11 milliónir fólk eru meint rakt av tí ringasta turkinum í mannaminni, er bara byrjanin til tað, sum liggur fyri framman, skrivar Christian Aid í frágreiðingini.

Tey ríku ídnaðarlondini hava ein stóran part av skyldini, og tey mugu tí eisini átaka sær ábyrgdina av at bøta um skaðan, skrivar felagsskapurin. Kyoto-sáttmálin var eitt stig tann rætta vegin, men ásetingarnar í honum muna alt ov lítið. Christian Aid vísir á, at USA, sum er tað ringasta dálkingarlandið, vil ikki gera eftir sáttmálanum, samstundis sum tann stóri búskaparvøksturin í londum sum Kina, India og Brasil hevur veksandi dálking har við sær.

# Vilja ikki hava “Norway”

Einaferð var SS “Norway” heimsins longsta ferðamannaskip, men nú skal tað høggjast upp.

SS “Norway” skuldi sum so mong onnur gomul skip høggjast upp á strondini í indiska landspartinum Gujarat, men í gjár boðaðu myndugleikarnir har frá, at teir vilja ikki hava skipið hagar. Orsøkin er, at ov nógv asbest er í skipinum, skrivar blaðið Times of India.

Upprunaliga ætlaðu eigararnir at senda skipið til Bangla Desh til upphøggingar, men heldur ikki har vilja myndugleikarnir vita av tí, eftir at umhvørvisfelagsskapir við Greenpeace á odda hava víst á, at umleið 900 tons av asbesti eru í skipinum.

Tað 315 metrar langa SS “Norway” er smíðað í Fraklandi og æt upprunaliga “France”. Norðmenn keyptu tað í 1979, men í 2003 varð tað tikið úr sigling eftir eina spreinging umborð.

*framhald av síðu 5*

- Men tað er ein spurningur, hvussu afturvirkandi tað er, tí ongin fær løn aftur í tíðina. Tað, sum er veruleikin, er, at tá ið pensjónin skal roknast út, skulu árini frá 1998 til nú, eisini teljast við.

Annars vísir Bill Justinussen á, at tað eru nøgvir tinglimir í samgonguni, sum eru hart ímóti broyta rúsdrekkalógina og høvdu teir staðið við síni prinsipp, hevði ongin møguleiki verið fyri at broyta rúsdrekkalógina.

- Tað er ivasamt at gera slíkar avtalur í politikki, hóast tær verða gjørdar javnan, tí tað er ikki gott fyri trúvirðið. Men tað eru nøkur mál, har tað ikki ber til hjá okkum at gera neyðsemjur og vit veruliga vilja gera mun. Og har er rúsdrekkalógin eitt.

- Var Miðflokkurin í samgonguni, hevði hann ikki verið í samgongu eftir, at rúsdrekkalógin varð broytt, staðfestir Bill Justinussen.